GÍ kom undan ódnarveðrinum

TB venjarin harmast um, at dysturin á Sevmýri yvirhøvur varð spældur. Hann og hinir halda ikki, at líkindini vóru til fótbóltsspæl

TB–GÍ
Jóannes Hansen

Gøtumenn komu í ódnarveðrinum sunnukvøldið til hús aftur við 3–0 sigri og harvið trimum kærkomnum stigum í viðførinum. Tað var einki at siga til, at teir vóru sera væl nøgdir.

Hóast vánalig líkindi, so varð dysturin á Tvøroyri avgreiddur, og gøtumenn munnu hóast alt vera fegnir um, at tað eydnaðist at fylla trý stig afturat í posan

Bartal Eliasen og Magni Jarnskor vóru leikbannaðir, og veðrið á Sevmýri var eins vánaligt, og tað var aðra staðni í landinum. Tí kundi tilvildin havt spælt inn.

– Eg havi ongantíð upplivað sovorðið, og eg haldi ikki, at dysturin skuldi havt verið spældur. Tað vóru ikki líkindi til fótbóltsspæl, og tað er harmuligt, tá bæði liðini hava vant taktiskt undan dystinum, at tilvildin skal hava so nógv at siga.

Tað er TB venjarin, Lynge Nielsen, sum sigur soleiðis. Hann ásannar, at GÍ hevði ein sera góðan miðvøll, og at teir høvdu væl fleiri málmøguleikar enn heimaliðið.

– Eg haldi, at mínir spælarar hava víst góða framgongd, og eg havi framvegis gott mót um, at vit fara at fáa fleiri stig. Næstu ferð verður tað VB í Vági. Teir kenni eg væl, og eg meti, at tað kann fara báðar vegir.

Bíðaðu leingi

Gøtumenn høvdu vindin ímóti í 1. hálvleiki, tá teir hildu tørn. Í 2. hálvleiki øtlaði hann rættuliga nógv, og tað var torført at hava tak á bóltinum.

GÍ fekk fyrsta málið, tá seinna umfarið var eitt stórt korter gamalt. Eftir innlegg dømdi dómarin brotsspark ímóti Nebosja, og Sámal Joensen var tryggur úr ellivu metrum. Tólv minuttir seinni økti Súni Fríði Johannesen. Long sending stiklaði hann eina ferð í vøllinum, áðrenn hann smekkaði til. Átjan minuttir undan leikloki staðfesti Súni Olsen.

Á GÍ liðnum var veteranurin Jóan Petur Olsen í miðverjuni fyri Bartal Eliasen, og Súni Olsen mannaði sentrala miðvøllin saman við Gidek og Sámali Joensen.

TB: Lars Müller – Vladimir Matijivic, Óli Johannesen, Nebosja Urtajl – Bárður Dimon, Olivur Abrahamsen, Einar Petersen, Craig Dean – Dan Mortensen, Jón Johannesen

GÍ: Hallur Hansen – Poul Ennigarð, Jóan Petur Olsen, Leivur Hansen – Hans Pauli Petersen, Sámal Joensen, Zdzislaw Janik, Súni Olsen – Súni Fríði Johannesen, Krystof Popczynski

Landsliðsspælar arnir verða vigaðir í kvøld

Henrik Larsen fer at hyggja at dystinum á Svangaskarði millum B68 og B36, áðrenn hann og hjálparvenjarin fara at taka støðu til, hvørjir tveir skulu sáldast frá

LANDSLIÐIÐ
Jóannes Hansen

Í síðstu viku fingu tjúgu spælarar boð til landsdystin, sum leygardagin verður ímóti Skotlandi. Samstundis fingu teir at vita, at tveir teirra fóru at verða sáldaðir frá eftir vikuskiftið. Men enn eru eingir vigaðir og funnir at vera ov lættir. Tað kemst av, at tveir dystir sunnudagin vóru av ongum. Dysturin millum EB/Streym og KÍ var ikki útsettur. Í skipanini stendur, at hann skuldi spælast í gjárkvøldið.

Útsetti dysturin millum Skála og NSÍ varð spældur í gjárkvøldið, tá ásetti dysturin millum EB/Streym og KÍ eisini varð spældur. Í kvøld klokkan 18.30 fara B68 og B36 at spæla á Svangaskarði.

Tá verður landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, millum áskoðararnar. Frammanfyri sær fer hann at hava seks spælarar, sum hava fingið landsliðsboð. Teir eru Fróði Benjaminsen og Hans Fróði Hansen á heimaliðnum og Jákup á Borg, Jens Kristian Hansen, Julian Johnsson og John Petersen á B36 liðnum.

Landsliðsevnini, sum um vikuskiftið vóru í eldinum heima á landi, vóru spælararnir í HB og Sámal Joensen hjá GÍ. Í Danmark spældi Christian Høgni Jacobsen við Vejle, meðan Jákup Mikkelsen sat á beinkinum hjá Molde í Noregi.

Í gjár var sera ivasamt, um Helgi L. Petersen fór at spæla á Skála í gjárkvøldið. Hann hevur havt ilt við at koma seg heilt eftir skaðan, sum hann fekk í landsdystinum ímóti Liktinstein. Harafturímóti var greitt, at Pól Thorsteinsson fór at spæla í gjár. Hann hevur verið skaddur síðstu vikurnar.

Jens Kristian Hansen hjá B36 hevur verið skaddur. Tann lítla tímban, sum B68 og B36 vóru á vøllinum á Toftum, bar til at staðfesta, at Jens Kristian er tøkur hjá landsliðs-venjaranum.

– Eftir dystin á Toftum í kvøld verður greitt, um allir teir, sum eru úttiknir, verða tøkir. Um teir verða tað, so verður neyðugt at sálda tveir spælarar frá, sigur Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjari hjá Henriki Larsen.

Landsliðið fer at venja fyrstu ferð á Svangaskarði fyrrapartin í morgin.

Jóhan og GÍ skiljast

Eftir tilsamans 11 ár sum venjari í Gøtu, noyðist Jóhan Nielsen nú at finna sær annað felag. Mánamorgunin boðaði leiðslan í GÍ frá, at Jóhan ikki heldur fram felagnum

Nevndin í Gøtu Ítróttarfelag hevur boðað frá, at Jóhan Nielsen ikki verður venjari hjá felagnum komandi kappingarár

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Vanliga er tað um hetta mundið, at feløg so smátt gera av, hvussu samansetingin av liðnum verður til komandi kappingarár. Í hesum liggur eisini venjaraspurningurin, og tað er neyvan at siga ov nógv, at fleiri feløg longu eru komin væl áleiðis í at tryggja sær venjara til komandi kappingarár.

Tað mundi tó koma eitt sindur óvart á, tá nevndin í GÍ mánadagin umvegis heimasíðu felagsins boðaði frá, at Jóhan Nielsen ikki verður venjari hjá felagnum, tá hetta kappingarárið er lokið. Í fráboðanini verður ikki sagt nakað um orsøkina til skilnaðin, men formaðurin í felagnum, Jógvan Gregersen, leggur tó dent á, at talan ikki er um illstøðu av nøkrum slag.

- Tað er tað ikki. Vit hava so onga orsøk at vera ónøgd um tað, sum hann hevur givið okkum. Úrslitini tala í so máta fyri seg, sigur formaðurin.

- Tað er bara so, at vit vóru komnir ásamt um, at tað nú var tíð til at steðga, og fyri at geva honum ein møguleika at finna sær nakað annað, var tað helst skilabest at boða frá hesum alt fyri eitt.

Mest vinnandi

Uttan at forsmáa aðrar venjarar, so ber helst til at siga, at við hesum hevur GÍ sagt farvæl við tann mest vinnandi føroyska fótbóltsvenjaran yvirhøvur. Aðrenn hann kom til Gøtu, var hann í drúgt tíðarskeið venjari hjá HB – umframt tvey ár í B36 – og upp ígjøgnum sjeyti- og áttatiárini vann hann hópin av heiðursmerkjum við eldra havnarfelagnum.

Í Gøtu hevur Jóhan virkað sum venjari í til samans 11 ár. Størsta bragd hansara í so máta var helst at leggja lunnar undir liðið, sum vann fýra meistaraheitið á rað í árunum, 1993-96.

GÍ hevur enn ikki boðað frá, hvør verður nýggjur venjari hjá felagnum, men á heimasíðuni verður sagt, at navnið á hesum væntandi verður almannakunngjørt innan tvær vikur. Men tað er eingin loyna, at í leikarahópinum hjá GÍ rennur ein maður, sum fyri tveimum árum síðani fekk FM-heitið suður til Vágs fyri fyrstu ferð, og neyvan er tað heilt av leið, at Krzystof Popczynski í øllum førum er í myndini til venjarasessin.

B36-VB 4-1 (0-0):

B36 vann við tíggju monnum

Hóast B36 trýsti vágbingar langt aftur á vøllin stóran part av dystinum, var tað ikki fyrr enn í seinastu minuttunum at sigurin kom í hús. B36 fekk ein mann útvístan tá støðan framvegis var 0-0

2. DEILD
Jákup Mørk

Hóast B36 í hálvan tíma spældi við 10 móti 11, so eydnaðist teimum kortini at vinna dystin móti VB
Mynd: Álvur Haraldsen

Bæði B36 og VB høvdu havt góð úrslit seinastu umførini - sjálvt um B36 tapti í Klaksvík- og tí var lagt upp til ein spennandi dyst í Havn leygardagin. Tá 2. deild er so jøvn sum hon er, vildi taparin av dystinum framvegis verða í vanda fyri niðurflyting, meðan vinnarin kundi hugsa um silvurheiðursmerki.

B36 betra liðið

Tað sást beinanvegin at B36 ætlaði sær trý stig, og harvið halda fast um annað plássið í deildini. Havnarmenn løgdu hart út og fingu trýst VB aftur á vøllin. Og soleiðis sá tað út meginpartin av fyrra hálvleiki.Men B36 fekk ikki nógv burturúr tí leikligu yvirvág sum var, og tað nærmasta liðið kom var okkurt fríspark beint uttan fyri brotsteigin hjá VB. Hesi fríspørk vóru vandmikil, men verjan og málmaðurin hjá VB klráðu skerini.

Nógvir bóltar gjørdist ov langir í uppspælinum, og fóru útav í tí lotinum sum B36 hevði í ryggin í fyrra hálvleiki.

Vágbingar vóru sjáldsamir gestir frammanfyri B36-málinum, og tá tað var gjørdist teir ongantíð serliga vandamiklir.

Lívligur seinni hálvleikur

Tað var ikki fyrr enn í seinna hálvleiki at lív kom í dystin. Tá 10 minuttir vóru farnir, fekk Heini í Skorini reytt kort fyri at vera nakað harðligur móti einum VB-ara. Nú sá heilt gott út hjá VB, sum undan dystinum uttan iva fór eftir tí eina stiginum.

Men tað var í veruleikanum útvísingin sum fekk B36 í gongd. Leikararnir blivu nógv ágrýtnari, og saman við nøkrum hepnum útskiftingum koyrdi spælið nógv betri.

Og trýstið gav úrslit tá góður tími var farin. Eftir eitt hornaspark fingu vágbingar ikki sparka bóltin burtur, og so kundi Karl Leonsson seta fótin á so bólturin fór í mál.

Men tað gingu ikki meir enn 3 minuttir, so hevði VB javnað. Eitt mótálop viðførdi, at Birgir Jørgensen varð spældur fríur, og hann skoraði trygt.

Nú gekk javnt á næstu løtuna við royndum á bæði málini. Ikki fyrr enn tað manglaðu 8 minuttir, kom næsta málið og tað fekk B36. Eitt innlegg kom úr vinstru síðu, og har var Karl Høgnesen fyrstur á bóltinum so hann fór í mál.

Eftir hetta skrædnaði fullkomuliga hjá VB, og móti endanum fekk B36 tvey mál aftrat. Fyrst var tað Ragnar Poulsen við beinleiðis frísparki og síðani skeyt John Thomsen seinasta málið í dystinum. Janus Kjærbo hjá VB fekk sítt annað gula kort seint í dystinum, og var tí rikin av vøllinum.

Tað bleiv sostatt til ein tryggan og uppibornan sigur til B36, hóast sigurin kom í hús seint í dystinum. Vágbingar mugu iðra seg um, at verjukendi taktikkurin ikki helt nakrar fáar minuttir aftrat.

Dysturin í tølum

B36-VB 4-1(0-0)
1-0: Karl Leonsson
1-1: Birgir Jørgensen
2-1: Karl Høgnesen
3-1: Ragnar Poulsen
4-1: John Thomsen

Støðan, 2. deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	FS V	14	10- 3 - 1	45	9	36	33
2	B36	14	6 - 4 - 4	22	22	0	22
3	Sumba	14	6 - 3 - 5	21	25	-4	21
4	B71	14	5 - 4 - 5	24	16	8	19
5	KÍ	14	5 - 4 - 5	21	22	-1	19
6	ÍF	14	5 - 3 - 6	31	29	2	18
7	LÍF	14	5 - 3 - 6	24	24	0	18
8	NSÍ	14	5 - 1 - 8	13	27	-14	16
9	VB	14	5 - 1 - 8	17	39	-22	16
10	HB	14	4 - 2 - 8	20	25	-5	14

LÍF-HB 3-1 (1-0):

Leirvík á tryggari grund

Við sigrinum á HB slapp LÍF sær úr niðurflytingarvandinum, har HB framvegis hevur leiklutin sum dumpikandidatur

2. DEILD
Jákup Mørk

Bæði LÍf og HB hava fyri ein stóran part av árinum verið í tungum sjógvi í næst bestu deildini. Leygardagin hittust tey bæði í Leirvík, og fyri báðar partar hevði dysturin alstóran týdning í royndunum at sleppa sær úr niðurflytingarvandanum.

Fótbóltslíkindini í Leirvík vóru kanska ikki av teimum allar bestu leygardagin, men tað var tó á ongan hátt soleiðis, sum tað var kring størsta partin av landinum sunnudagin.

Váti vøllurin tóktist tó vera til stóran ampa fyri gestirnar, sum høvdu ilt við at fáa spælið at hanga saman, og yvirhøvur var tað soleiðis, at heimaliðið sat á so gott sum øllum.

Tí var tað eisini fult uppiborið, at Petur Sjúrðarberg undan steðginum kundi skjóta leirvíkingar upp á 1-0, men HB megnaði tó at reisa seg nakað aftur, tá Danny Rasmussen nakakð eftir steðgin fekk javnvág í aftur roknskapin.

Hóast málið gav HB eina lítla vón, so var tað tó alla tíðina soleiðis, at ein heimasigur lúrdi, og tá Tomek Rezel nakað seinni aftur kundi leggja leirvíkingarnar á odda, mundu flestu av gestunum ásanna, at dysturin var taptur, og í so máta var seinasta málið hjá Fróða Joensen bert ein staðfesting av veruleikanum.

Kunnu missa sessin

Og veruleikin er, at HB í løtuni liggur á niðasta sessinum í aðru deild, og soleiðis eru fremstu dumpikandidatarnir, nú bert fýra umfør eru eftir at spæla.

Og tó at teir í HB neyvan hava slept allari vón, so slepst ikki undan, at talan er um fýra sera torførar dystir, sum nú standa á skránni. Komandi vikuskiftið hava teir dyst móti grannunum úr B36, sum stríðast fyri at halda fast um silvurmerkini. Síðani gongur leiðin til Sumbia, har heimaliðið helst stríðist fyri møguleikanum at vinna rætt til upp- og niðurflytingardyst. Tað gera fuglfirðingar helst eisini, tá teir koma til Havnar, og í seinasta uimfarinum er talan um dyst móti KÍ, sum tykist standa seg sera væl á heimavølli, so í løtuni sær ógvuliga svart út hjá HB. Ikki minst tí tað aloftast er so, at tað er av stórum týdningi fyri besta liðið í felagnum, at leiðin niður til eykamenninar er so stutt sum gjørligt.

Hjá leirvíkingum líkist árið nú hinvegin eitt av teimum vanligu, har liðið endar onku staðni miðskeiðis á stigatalvuni. Gaman í er støðan somikið tøtt, at teir ikki skulu kenna seg alt ov tryggar, men helst fara teir at skava okkurt stigið afturat saman, og hinvegin er frástøðan upp til heiðursmerkini heldur ikki so stór, so enn hevur liðið nakað at spæla fyri, hóast tað verður torført, tá teir komandi vikuskifti skulu til Vágarnar, har heimaliðið hevur riggað til uppflytingargildið.

LÍF-HB 3-1(1-0)

1-0: Petur Sjúrðarberg
1-1: Danny Rasmussen
2-1: Tomek Rezel

Christian Høgni á vongverjanum

Tað kom óvart á, at Vejle skuldi snáva á heimavølli ímóti grannunum úr Fredericia

DANMARK 1. DEILD
Jóannes Hansen

Fyrrapartin í morgin fer Christian Høgni Jacobsen undir fyrireikingarnar til landsdystin leygardagin ímóti Skotlandi. Hann er valdur sum ein av møguleikunum í álopinum. Hóast hjálparvenjarin hjá Henrik Larsen, Jógvan Martin Olsen, fyrr í summar hevði Christian Høgna á vongverjanum í NSÍ, so er Vejle spælarin kanska fyrsta valið til føroyska álopið leygardagin.

Men Christian Høgni Jacobsen fekk ikki venjing í álopsspælinum sunnudagin. Hann var vongverji í høgru allar 90 minuttirnar, og tað kann væl vera, at tað verður uppaftur torførari hjá honum at sleppa upp í part aftur í fremstu rað. Fríggjadagin leigaði Vejle Peter Degn frá Brøndby. Hann er ein av spælarunum, sum Michael Laudrup sáldaði frá, tá hann gjørdist venjari. Peter Degn skal fyribils vera í Vejle inntil 30. juni komandi ár. Hann hevur áður spælt í AGF og Everton.

Vejle hevði sunnudagin vitjan av grannunum úr Fredericia. Hesir hava altíð verið fótbóltsligi lítli beiggin í tríkantsøkinum, sum økið Vejle–Fredericia–Kolding verður rópt. Tí var tað einki minni enn ein sensatión, at teir fóru til hús við 1–0 sigri. Áskoðarafjøldin í góðveðrinum var metstór fyri hetta kappingarárið – 2.231 – og sjálvsagt kom tapið sera illa við hjá Vejle.

Fredericia var sera verjukent. Teir komu á odda, tá tað bara restaði ein lítil løta av fyrra umfarinum, og so vardu teir. Vejle hevði møguleikar, men teir høvdu ilt við at bróta ígjøgnum í borðunum, og vejlensarar á og kring vøllin vóru sera nipnir, tá dómarin hevði bríkslað fyri síðstu ferð, og grannarnir stóðu við øllum stigunum.

Vejle hevur tíggju stig – tað sama sum Herfølge og Frem. Hjá hvørgum teirra royndist vikuskiftið nakað serligt. Frem megnaði bara 1–1 á heimavøllinum í Valby ímóti B1913, og Herfølge tapti rudduliga 3–0 í Randers. Freja er næstfremst í 1. deild við tólv stigum.

Ølstykke er fremst við fjúrtan stigum. Hesa ferð vunnu teir 4–2 á Hvidovre, sum Óli Johannesen spældi við síðsta ár. Føroyski landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, hevði ábyrgdina, tá Ølstykke síðsta kappingarár flutti upp. Nú er Benny Johansen venjari hjá Ølstykke. Tað var hann, sum fyrr í ár næstan var venjari hjá landsliðnum.